# Løgtingið lækkar skattin

**Løgtingið hevði fleiri uppskot um skattalættar at taka støðu til mikudagin. Hóast eljustríð stóðst um okkurt teirra, endaði viðgerðin við, at samgongan fekk sítt uppskot um skattalætta ígjøgnum. Andstøðuuppskotini vórðu feld**

SKATTALÆTTI
*Magnus Dam*



*Skattalættauppskotið hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, varð samtykt í tinginum mikudagin*

Hóast 2.000 krónur meira í barnafrádrádrátti eina løtu hótti við at forkoma samgonguni, so funnu samgongutingmenn stevið aftur og samdust um uppskotið frá Karsten Hansen um at lækka skattin.

Uppskotið hjá fíggjarmálaráðharranum ber í sær, at føroyingar fáa umleið 50 milliónir krónur meira eftir í lummunum eftir skatt næsta ár. Í 2002 lækkar skatturin eitt vet afturat, og tá verða umleið 31 milliónir krónur meira eftir til nýstlu, metir Fíggjarmálastýrið.

Uppskotið er skrúvað soleiðis saman, at skattaprosentini fyri trý tey niðastu stigini í skattastiganum verða lækkað nakað yvir tvey ár. Harumframt verður botnfrádrátturin í lands- og kommunuskattinum hækkaður. Botnfrádrátturin hækkar 2.000 krónur 1. januar næsta ár, og 1. januar 2002 hækkar hann aftur 2000 krónur – upp í 21.000 krónur. Uppskotið broytir eisini inntøkumarkið í skattastiganum, sum áður var 140.000 krónur, upp í 150.000 krónur.

## Samgongutingmenn hóttu

Hóast hetta uppskotið var tað, sum at enda varð samtykt, so vóru eisini onnur uppskot á borðinum, sum skuldu lætta um skatta- og avgjaldstrýstið.

Uppskotið, sum elvdi til størstu ósemjuna, var tað frá Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum um at hækka barnafrádráttin 2.000 krónur. Hetta var nakað, sum hóvaði fleiri fólkafloksmonnum, og tá ið málið kom til aðru viðgerð, boðaðu Óli Breckmann og Rúna Sivertsen frá, at tey kundu hugsað sær at atkvøða fyri andstøðuuppskotinum. Hetta var ikki júst tað, sum meirilutin í fíggjarnevndini hevði mælt til, og øði kom nú í Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

– Fólkaflokkurin kundi ikki fara uttan um sína egnu samgongu og atkvøða fyri einum andstøðuuppskotið, søgdu hinir báðir samgonguflokkarnir. Orðið samgonguslit var fleiri ferðir nevnt undir harðmæltu viðgerðini, og tað var helst hetta, sum rak teir báðar samgongutingmenninar aftur í rætt.

– Flongdir hundar, kallaðu andstøðutingmenn Óla Breckman og Rúnu Sivertsen, sum kúvendu, tá ið málið eftir ein stuttan nevndarfund kom aftur úr fíggjarnevndini. Tá hevði Karsten Hansen verið í fíggjarnevndini og greitt frá, at Fíggjarmálastýrið arbeiðir við at endurskoða barnafrádráttin.

Hetta var nóg góð trygd hjá Óla Breckmann, sum annars fegnaðist um, at tað eydnaðist at samtykkja skattalættan hjá Karsten Hansen.

## Bensinprísurin tann sami

Eitt uppskot frá Henrik Old um at lække avgjaldið á blýfríum bensini elvdi eisini til rættiligt kjak á fundinum týsdagin. Hetta uppskotið hóvaði eisini fleiri samgongutingmonnum, men tá samanum kom, restaði ein atkvøða í til at fáa uppskotið samtykt. Við 12 atkvøðum fyri og 12 ímóti, var atkvøðan hjá Óla Breckmann avgerandi atkvøðan. Hann valdi at atkvøða blankt, og sostatt fall eisini tað málið.

Uppskotini frá andstøðuni um at lække skattastigan á øllum inntøkum upp til 140.000 krónum við tveimum prosentum varð somuleiðis felt. Hevði tað verið samtykt, so hevði tað saman við hækkaða barnafrádráttinum givið vanliga føroyinginum umleið 84 milliónir krónur meira at liva fyri næsta ár. At enda feldi løgtingið eitt uppskot um at hækka serliga pensjónista-frádráttin, sum hevði givið pensjónistunum umleið 10 milliónir krónur meira at liva fyri næsta ár. Hetta var eisini eitt andstøðuuppskot, og eisini her vístu samgongutingmenn á, at Fíggjarmálastýrið arbeiðir við skatta- og avgjaldsspurningum í breiðari høpi.

Eftir tingfundin mikudagin er greitt, at tað verður nakað bíligari at vera føroyingur komandi tvey árini. Og lítil ivi er um, at trýstið á Karsten Hansen um at lyfta lokið á landskassanum eitt sindur afturat, er vorðið uppaftur størri enn tað var áðrenn tingfundinum.

# Útskiftingar í donsku stjórnini

**Poul Nyrup Rasmussen gjørdi í gjár umfatandi broytingar í stjórnini hjá sær, eftir at Niels Helveg Petersen og Hans Hækkerup fara frá sum ávikavist uttanríkisráðharri og verjumálaráðharri**

STJÓRNARBROYTING
*Magnus Dam*

Tveir ráðharrar fingu durafjórðingin, og pláss var fyri fimm nýggjum andlitum, tá ið Poul Nyrup Rasmsussen í gjár boðaði frá broytingum í stjórnini.

Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharri, boðaði fyrradagin frá, at hann leggur frá sær, tí hann ikki metir seg vera rætta mannin at umsita uttanríkispolitikkin hjá Danmark, eftir at danir atkvøddu nei til evruna. Helveg er heitur talsmaður tøttum evropeiskum samstarvi, og hann heldur ikki, at hann er tann rætti at tæna áhugamálunum hjá Danmark, sum á fleiri økjum hevur valt at standa uttanfyri evropeiska samstarvið.

Hans Hækkerup fekk herfyri nýtt starv sum ST-ovasti í Kosovo, og Nyrup kundi tí fara at hugsa um at gera tær útskiftingarnar í stjórnini, sum fólk leingi hava bíðað eftir.

Tann týdningarmiklasti ráðharrin hjá Nyrup, Mogens Lykketoft, skal í nýggju stjórnini taka sær av uttanríkispolitikkinum í staðin fyri Niels Helveg Petersen. Saman við Nyrup er tað framum øll onnur Lykketoft, sum myndar politikkin hjá stjórnini, og hann hevur verið fíggjarmálaráðharri, líka síðani Nyrup gjørdist forsætisráðharri í 1993. Pia Gjellerup, vinnnumálaráðharri, skal avloysa Lykketoft í Fíggjarmálaráðnum.

Nýggjur verjumálaráðharri fyri Hans Hækkerup verður Jan Trøjborg, sum hevur verið menningarmálaráðharri.



*Við broytingunum í stjórnini vónar Nyrup at vinna álitið frá fólki aftur, men hesum ivast donsku fjølmiðlarnir í*

## Stavad verður sitandi

Hóast hann er millum teir mest umstríddu ráðharrarnar í stjórnini, so hevur Nyrup valt at varðveita skattamálaráðharran Ole Stavad. Hann verður kortini fluttur í Vinnumálaráðið, og við hesum vónar Nyrup helst, at hann ikki verður so ofta í andgletti longur. Hann ber orð fyri at krevja alt tað inn í skatti, sum krevjast kann – og so eitt sindur afturat. Hetta hevur givið andstøðuni í Fólkatinginum høvi til nógv álop á Nyrup-stjórnina, og eitt komandi Fólkatingsval fer helst í stóran mun at snúgva seg um høga skatta- og avgjaldstrýstið í Danmark.

At taka sær av skattaviðurskiftunum hevur Nyrup valt sær Frode Sørensen, sum er rættiliga nýggjur í politikki. Hann hevur verið bankamaður alt sítt lív, og kom ikki í Fólkatingið fyrrenn á valinum í 1998. Í bankaheiminum ber hann orð fyri at vera ein dugnaligur maður.

## Fimm nýggj andlit

Frode Sørensen er eitt av fimm nýggjum andlitum, sum verða at síggja í nýggju stjórnini. Yngsti ráðharrin er tann 27 ára gamla Lotte Bundsgaard, sum verður nýggjur íbúðarmálaráðharri. Hon avloysir Jytte Andersen, sum hevur fingið durafjórðingin frá Nyrup. Ein annar umstríddur ráðharri, sum rýkur út, er Sonja Mikkelsen, heilsumálaráðharri. Í hennara stað kemur Arne Rolighed, sum hevur drúgvar royndir á heilsuøkinum. Hann tók í ár við starvinum sum formaður í danska Felagnum móti Krabbameini.

Pláss verður eisini fyri tveimum nýggjum radikalum ráðharrum. Landsformaðurin í Radikala Vinstraflokkinum, Johannes Lebech, verður nýggjur kirkjumálaráðharri, og Anita Bay Bundegaard verður nýggjur menningarmálaráðharri. Hon starvast í løtuni á blaðnum Politiken.

## Styrkir ikki um Nyrup

Spurningurin er, um Nyrup við nýggju stjórnini hevur styrkt um støðuna hjá flokki sínum, sum stendur seg sera illa í donsku veljarakanningunum. Anders Fogh Rasmussen vil fegin sleppa framat forsætisráðharrasessinum, og gongst sum veljarakanningarnar spáa, so verður hann næsti forstætisráðharrin í Danmark.

Við broytingunum í stjórnini vónar Nyrup at vinna álitið frá fólki aftur, men hesum ivast donsku fjølmiðlarnir í. Fleiri bløð skriva í oddagreinunum í dag, at broytingarnar ikki muna nóg nógv, og at Nyrup ikki stendur styrktur eftir dagin í gjár.



# Fær avleiðingar fyri kollfirðingar

**– Arbeiðsmenn í Kollafirði vilja ikki upp í Havnar Arbeiðsmannafelag.Tað fer at fáa avleiðingar, sigur Karl Johansen, formaður í havnar Arbeiðsmannafelag**

FAKFELAGSSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*



*Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag sigur, at tað verður ikki góðtikið, at kollfirðingar blíva verandi í Føroya Arbeiðarafelag. Halda teir fast um tað, fer tað avleiðingar, sigur Karl Johansen*

– Vilja arbeiðsmenn í Kollafirði ikki melda seg úr Føroya Arbeiðarafelag og koma upp í Havnar Arbeiðsmannafelag, fer tað sjálvsagt at fáa avleiðingar. Tað sigur Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hann sigur, at nú Havnin og Kollafjørður eru løgd saman, kann tað ikki góðtakast, at Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag ikki eisini meldar seg uppí Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Skulu teir framhaldandi verða limir í Føroya Arbeiðarafelag, koma vit at hava tvey feløg, sum eru í somu kommunu. Somuleiðis koma vit at hava tvey feløg, sum hava samráðingarrættin til arbeiðsmenninar í somu kmmunu. Og tað kann eisini hugsast, at sáttmálarnir verða ymiskir, og so koma arbeiðsmenn í somu kommunu at arbeiða undir ymsum treytum, og tað gongur ikki, sigur Karl Johansen

Hann sigur tí, at tað fer at fáa avleiðingar, um kollfirðingar halda fast við sína støðu um at blíva verandi í Føroya Arbeiðarafelag.

– So fara vit sjálvsagt ikki at góðtaka, at kollfirðingar koma til Havnar at arbeiða. Tað fer eisini at fáa avleiðingar, fyri tær tænastur, sum limir í Havnar Arbeiðsmannafelag, gera, og fara at gera í Kollafirði, eitt nú ruskkoyring, busskoyring, kavarudding, o.s.fr., tí tær tænastur fara ikki at halda fram, sigur hann.

## Eru ikki spurdir

Karl Johansen fýlist eisini harðliga á mannagongdina í hesum máli.

– Vit høvdu fund við Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag og Føroya Arbeiðarafelag. Tá upplýstu tey bæði feløgini, at kollfirðingar høvdu ikki tikið støðu til limaskap í Havnar Arbeiðsmannafelag, men at purningurin skuldi leggjast fyri limirnar til avgerðar.

– Men tríggjar dagar seinni, upplýsa tey, at málið varð avgjørt, longu á aðalfundi í oktober.

– Spurningurin er nú, um Føroya Arbeiðarafelag og Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag, siga ósatt. Ella um tað er ósatt, at málið hevur verið viðgjørt á aðalfundi. Í hvussu so er, veit eg onki um, at tað var á skránni á aðalfundinum hjá felagnum.

Karl Johansen sigur, at tað einasta, hann vil, er, at málið verður lagt fyri limirnar í Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag til avgerðar. Sannleikin er tann, at málið hevur ongantíð verðið lagt fyri limirnar í Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag og tað heldur hann var tað allarminsta.

Hans Madsen, sum er formaður í Kollafjarðar Arbeiðsmannafelag, sigur at spurningurin er viðgjørdur á limafundi í Kollafjarðar arbeiðsmannafelag og niðurstøðan er, at teir vilja ikki upp í Havnar Arbeiðsmannafelag.

# Frádráttur skerjast ella takast av

**Búskaparráðið heldur, at føroyskir handverkarar ikki skulu hava fyrimun av at arbeiða uttanlands**

ARBEIÐSMEGI
*Eyðun Klakstein*

Eftirspurningurin á arbeiðsmegi í Føroyum er so stórur, at Búskaparráðið heldur tað verða skeivt, at til dømis føroyskir hand verkarar hava fyrimun av at arbeiða uttanlands.

Hetta sigur ráðið í nýggju frágreiðing síni, sum kom fyri viku síðani.

Uttanlandsfrádrátturin hevur við sær, at eitt nú handverkarar hava fyrimun av at arbeiða í útlondum.

- Hetta er serliga óheppið í tíðum við stórum eftirspurningi á arbeiðsmegi sum heild, og kanska serliga í byggivinnuni. Frádrátturin eigur tí at skerjast og helst takast heilt burtur, sigur Búskaparráðið.

## Arbeiðsstyrkin vaksandi

Støðugi eftirspurningurin á arbeiðsmegi ger, at tað framvegis koma fólk í arbeiði. Hetta eru antin fólk, sum hava verið arbeiðsleys, ella fólk sum flyta heimaftur til Føroya og fáa arbeiði.

Arbeiðsloysið er so gott sum burtur. Í september mánaði vóru 748 fól skrásett sum arbeiðsleys, og tað svarar til 3% av arbeiðsstyrkini. Hetta er ein minking upp á eitt prosentstig samanborið við sama mánað í fjør.

Fleiri føroyingar flyta heimaftur, sum fóru undan kreppuni, og pláss er fyri fleiri, sigur Búskaparráðið. Frá januar til september var nettoflytingin til Føroya 374 fólk.


